

*Lena L. Mohr, nýggjur stjóri á sansum og Høgni Rasmussen, sum hevur verið stjóri øll 10 árini, síðani felagið varð stovnað*

# Javnstøða á Sansum

**- At vit seta Lenu sum stjóra er eitt stig á leiðini til eitt betri samfelag, har bæði kynini taka lut - har vit gagnnýta okkara tilfeingi á besta hátt. Tað er tað, vit royna, segði Høgni Rasmussen, stjóri á Reklamuvirkinum Sansum á móttøku fríggjadagin í sambandi við, at Lena L. Mohr eisini varð sett sum stjóri í felagnum**

MÓTTØKA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Fríggjadagin hevði Reklamuvirkið Sansir móttøku í Listaskálanum í Havn í sambandi við, at Lena Mohr herfyri varð sett sum stóri í fyritøkuni saman við Høgna Rasmussen. Á móttøkuni greiddi Høgni Rasmussen frá, at Sansir hevur tíggju ár á baki. Hann vísti á, at fyritøkan hesa tíðina hevur broytt seg frá at vera ein lýsingarfyritøka til at verða ein samskiftisfyritøka við teimum best útbúnu fólkunum innan sniðgávu, hugskotsgenerering, tekstaskriving, samskifti og samskiftisstrategi. Hann segði eisini, at fyritøkan hetta tíðarskeiðið hevur bygt upp eina kunningartøknideild, sum hevur ta bestu vitanina um heimasíður og heimasíðuskipanir í Føroyum. Sansir hava deildir í Føroyum og Danmark, umframt at tey hava starvsfólk í fýra londum, Føroyum, Danmark, Íslandi og Peru.

- Fyri tíggju árum síðani vóru vit trý, nú eru vit 33. Serliga hevur tað gingið skjótt seinastu fýra árini, tí seinastu fýra árini er umsetningurin vaksin ikki minni enn tríggjar ferðir, og vit vaksa enn, um enn eitt sindur róligari, segði Høgni Rasmussen, sum eisini vísti á, at útbúgvingar- og førleikastøðið á Sansum er høgt:

- Av teimum 33 starvsfólkunum hava 20 eina BA ella BA-líknandi útbúgving, og har av eru seks kandidatar. Tey, sum ikki eru BA ella líknandi hava næstan øll ein holla útbúgving, og eru tey bestu á sínum øki í Føroyum, segði hann.

Høgni Rasmussen lýsti eisini tann týdning, sum Lena Mohr eftir hansara tykki hevur havt fyri Sansir:

- Hon spælir ein sera stóran leiklut í menninginin á Sansum. Tá hon varð sett, segði hon: "Eg vil verða við til at útvikla Sansir og at flyta Sansir út í heim". Kanska var tað hesin setningur sum serliga passaði okkum væl, tí hon er ómetaliga ágrýtin, serstakliga nærløgd og djúphugsin. Eg eri sera impulsivur, havi hug at seta ting í gongd og seti nýggj ting í gongd alla tíðina. Tá er tað gott at hava ein persón, sum dámar at hugsa tingini væl ígjøgnum. Tað kann vera eitt sindur irriterandi við hvørt, men er avgjørt neyðugt. Eg haldi, vit komplimentera hvønn annað væl, segði Høgni Rasmussen.

Hann vísti eisini á, at eitt tað mest markanta, sum Lena hevur verið við til at seta í gongd er blaðið Kvinna. Kvinna var født í samstarvinum millum kvinnurnar, sum arbeiddu á Sansum í 2002. Kvinna var ein tungur burður. Vit niðurløgdu ætlanina tvær ferðir fyri síðani triðju ferðina, at seta ætlanina í verk, segði hann.

Stjórin á Sansum vísti eisini á, at sum leiðari ella mentor ella sum coach er tað serliga evnini at draga framá, sum Sansir hava notið gott av við Lenu Mohr í leiðsluni. Hann segði, at hon er góð sum supervisari hjá ráðgevunum, tá stórmál skulu loysast.

- Fyri fýra árum síðani avgjørdu vit at styrkja okkum á mest grundleggjandi økjunum: Vit hava styrkt okkum í sniðgávuni, í hugskotsgenerering og í ráðgevingini innan internetøki, innan samskifti og samskiftisstrategi generelt - og so eisini á KT-menningarøkinum.

- Vit settu í hesum tíðarskeiði fýra nýggjar sniðgevar, fýra ráðgevar innan samskifti og samskiftisstrategi, og tveir nýggjar forritarar umframt tríggjar forritarar í Peru.

- Allir teir fýra nýggju sniðgevararnir eru danir, og høvdu vit gjørt avtalu við tey um, at tey skuldu arbeiða í Føroyum eitt avmarkað tíðarskeið. Hetta gjørdist tí høvið at lata eina deild upp í Keypmannahavn. Um vit ikki lótu hesa deildina upp, so mistu vit fýra dugnaligar sniðgevar, sum enntá hava innlit í føroysk viðurskifti, segði Høgni Rasmussen.

Hann vísti víðari á, at hetta tvingaði Sansir út.

- Vit høvdu ætlaninar, men útviklingurin tvingaði okkum. Men ikki bara Sansir hava úthug, okkara ungdómur og okkara væl útbúnu fólk hava eisini hug at fara út. Her í Føroyum kann við hvørt gerast rættiliga trongligt og trongskygt.

Vit mugu gera okkum greitt, at nútíðarmenniskja savnast í metropolum. Útjaðarin minkar ella hvørv-

# Føroyingur stýra stórari verkætlan í Grønlandi

**Nú lítil og ongin toskur er eftir í føroyskum sjógvi, eru føroyingar í gongd við eina risastóra toskaverkætlan í Grønlandi. Ragnhild í Skorini Jacobsen úr Klaksvík skal verða fíggjarleiðari fyri alt hetta virksemið, sum umfatar bæði virkir, skip, og bátar**

FISKIVINNA
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Føroyskt vinnulív er í ferð við at gera stórar íløgur í Grønlendsku fiskivinnuna. JFK Trol hevur saman við øðrum sett á stovn nýtt felag, sum hevur keypt trý flakavirkir í Qagortoq, Nanortalik og Kuummiut. Eisini eru fleiri skip og bátar keypt til stóru verkætlanina.

Fíggjarleiðarin fyri hesa stóru verkætlan er 41 ára gamla Ragnhild í Skorini Jacobsen, sum tey seinastu sjey árini hevur verið fíggjarleiðari hjá Maru Seafood.

Ragnhild í Skorini Jacobsen sigur, at JFK velur at innvestera í grønlendsku toskavinnuna, tí toskastovnurin í Grønlandi veksur, meðan støðan í Føroyum er tann øvugta.

Nýggi fíggjarleiðarin í nýstovnaða felagnum, Atlantic Fishing, gleðir seg at fara undir stóru uppgávuna í kalda landinum í norði.

- Tá Hanus Hansen ringdi og bjóðaði mær starvið, var fyrsti tankin, yes, hetta er sakin. Mær dámar avbjóðingar og Grønland hevur havt eitt serligt pláss í mínum hjarta, líka síðani eg var har uppi og hjálpti til á barnalegunum hjá Hans Sivertsen í 1982 og 1983.



*- Tá Hanus Hansen ringdi og bjóðaði mær starvið, var fyrsti tankin, yes, hetta er sakin. Mær dámar avbjóðingar og Grønland hevur havt eitt serligt pláss í mínum hjarta, sigur Ragnhild í Skorini Jacobsen, sum er sett sum fíggjarleiðari á stórari føroyskari verkætlan í grønlendsku toskavinnuni*

Tá Ragnhild kemur til Grønlands skal hon fyrst vera einar tríggjar, fýra dagar í Qagortog, har høvðusstøðin skal vera. Síðani skal hon til Nuuk at vera í eina viku, har Edvard Niklasen rekur eitt virki og brúkar nakrar skipanir, sum hon skal seta seg inn í.

- Eg kenni onki til fiskivinnuna í Grønlandi, men eg haldi, at tað er spennandi at seta seg inn í nýggj ting.

- Tá tað kemur til familjuna, hevði tað kanska betri um eg fekk tilboði fyri 10 árum síðani ella um tvey ár. Men tilboðið kom nú, so nú fara vit. Hetta er ov spennandi at takka nei til.

Ragnhild er gift Markusi Jacobsen, og tey eiga fýra børn í aldrinum 16 til 22. Bæði maður og børn stuðla avgerðini at fara til Grønlands. Yngsti sonurin kemur við, meðan døturnar báðar skulu búgva í húsunum í Føroyum. Elsti sonurin er fluttur heimanifrá.

- Eg veit ikki, hvussu leingi vit vera har uppi. Møguliga verður tað í tvey ár, men um vit trívast kann tað gott verða longri.

- Arbeiðið fer uttan iva at fylla ótrúliga nógv í byrjanini. Bæði tí eg byrji einsamøll, og tí at tíðin frá juni til september er tíðarskeiðið, tá smábátarnir fiska.

Um eitt ár væntar hon, at tey hava 3-4 fólk á høvuðsskrivstovuni, sum skal vera í Qagortoq, og um 3 ár vera tey vónandi fimm til seks fólk. Í allari verkætlanini vera væntandi umleið 150 starvsfólk.

## Í fiskivinnuni av tilvild

Ragnhild í Skorini Jacobsen er alt annað enn óroynd, nú hon fer til Grønlands. Sum fíggjarleiðari hjá Maru Seafood, hevur hon umsitið upp til 18 roknskapir, og verið við til at keypa, fusionera og selja fyritøkur, skip og virkir. Bara í fjør vórðu átta bátar keyptir.

Og inntil fyri tveimum árum síðani sat arbeiðssama klaksvíkskonan einsamøll við øllum roknskapunum.

- Eg havi elskað tað hvønn dag. Onkran dag havi eg arbeitt 18 tímar, men eg havi onga løtu kent tað tungt. Eg haldi, at so leingi sum tær dámar tað, tú gert, verður tú ikki strongd.

Tað eru ikki nógvar leiðandi kvinnur í føroysku fiskivinnuni. Ragnhild í Skorini Jacobsen sigur, at tað var av tilvild, at hon endaði í fiski.

- Jóhan Páll Joensen hevði keypt nýtt virkið og hevði brúk fyri einum at halda skil á roknskapinum. Eg arbeiddi tá í vekslaranum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Kona Jóhan Páll arbeiddi eisini á sjúkrahúsinum og sá, at eg altíð sat og las í teldu- og roknskaparbókum, sigur Ragnhild flennandi.

Ragnhild er útlærd skrivstovufólk, men var heimagangandi í 13 ár, inntil yngsti sonurin fór í skúla.

- Tá Jóhan Páll bað meg koma at arbeiða fyri seg, kendi eg meg sera óroyndan, og samstundis helt eg, at eg mátti duga alt 110 prosent.

- Í dag byrji eg aftur upp á nakað heilt nýtt, men nú havi eg ongan tørv á at duga alt. Eg veit, at eg dugi at spyrja, og tað røkkur ofta langt. Nú veit eg, at trupulleikar eru til fyri at verða loystir.